tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 98 Fríggjadagur 24. mai 1996 70. árgangur Krónur 7,00

## Kanningin á Landssjúkrahúsinum:



# Landsstýrið ger ongan arbeiðssetning

*Landsstýrið hevur broytt hugsan. Danska fyritøkan Dios hevur sjálv gjørt uppskot til, hvussu kanningin av landssjúkrahúsinum skal leggjast til rættis, og landsstýrið hevur góðtikið setningin. Landsstýrið ætlar sær ikki á nakran hátt at avmarka kanningina*

**Síða 3**

*Karl Johansen:*

## Vígdis kann sjálv keypa Farfish

*– Um Vígdis Johannesen er ónøgd, kundi Havnar Arbeiðskvinnufelag sjálvt roynt at sett okkurt á stovn, fyri at fingið arbeiðspláss. Nú er Farfish til sølu, so tær kunnu sjálvar keypa virkið, sigur Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

**Síða 3**



*Herr Ziska frá oljufyrisitingini er við á oljumessu í California*

## Marknaðarføra føroysku undirgrundina

*Føroyingar luttaka á stórari oljumessu í San Diego í California. Har verður víst fram ymiskt um Føroyar og tær kanningar, sum longu eru gjørdar í sambandi við leitingina eftir olju og gassi*

**Síða 6**

*Høgni Debes Joensen, landslækni:*

## – Vendið tykkum til lækna, er minsti illgruni um meningitis

*Fyri fyrstu ferð í tvey ár, eru nú aftur tilburðir av meningitis sjúkini í Føroyum. Landslæknin mælir fólki til at kenna sjúkueyðkennini, og venda sær til læknan, er minsti illgrunin um sjúkuna*

**Síða 3**



*Høgni Debes Joensen, landslækni*

